# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Byrja í skúla sum 6 ára gomul?

Ein bólkur, sum viðger støðuna í føroyska fólkaskúlanum, hevur skotið upp, at føroysk børn eiga at fara í skúla eitt ár fyrr enn nú.

Hetta er eitt áhugavert uppskot. At børn byrja í skúlanum 6 ára gomul er rættiliga vanligt aðrastaðni, og hjá okkara stóra granna í ein beinan sunnan, byrja tey enn fyrr, uttan at børnini tykjast taka skaða av tí.

Tað var ikki gott, tá vit fingu at vita, at t.d. lesiførleikin var alt ov vánaligur hjá føroyskum børnum. Hetta vóru skelkandi tíðindi, tí um lesiførleikin haltar, so halta evnini at tilogna sær nýggja vitan eisini. Tí kunnu vit sum samfelag ikki liva við einum slíkum úrsliti.

At koyra børnini í skúla eitt ár fyrr loysir nokk ikki nakran trupulleika av sær sjálvum, tí har skal nógv annað til enn tað, men tað burdi bøtt um støðuna. Tað kundi tikið okkum upp á støðið í t.d. Noregi og Bretlandi, har børn duga at lesa veruligar barnabøkur sum 7 ára gomul.

Spurningurin er tó, um vit skulu fylgja danska fordømið við forskúla, tí tað kann forvirra børn og vaksin. Er talan um eitt dagstovnatilboð ella er talan um undirvísing? Tá børn í øðrum londum, har ímillum nøkur av heimsins leiðandi og fólkaríkastu londum, kunnu sita á skúlabeinki við lærarum rundanum seg sum 6 ára gomul, so er ilt at síggja, hví hetta ikki skal bera til í Føroyum.

Ein annar møguleiki er, at hetta nýggja skúlaárið verður skipað við lærarum og pedagogum. Tað ræður um at gera skiftið frá dagstovni til skúla so trygt og gott sum møguligt. Eitt annað, ið eigur at vera havt í huga, er, at ikki øll lond, sum byrja skúlan við 6 ára aldur, klára seg eins væl. Her eru sum nevnt nógv viðurskifti at leggja upp fyri. Tískil eigur hetta mál at fyrireikast sera væl.

**Sosialurin**

## Taktleyst TILPISS

**VIRGAR T. DALSGAARD**



Fyri nøkrum døgum síðani hevði *Sosialurin* á sjálvari fyrstu síðu eitt løgið úttalilsi frá einum *íslendskum* bankastjóra, sum vágaði sær at leggja seg beinleiðis politiserandi út í føroysk fíggjarviðurskifti. M .a. visti hesin stjóri at siga, at føroyingar áttu at privatisera pengastovnarnar. Grundgevingarnar hjá honum vóru naivir banalitetir, sum bara vóru funderaðir upp á leysar gitingar, men als ikki nakra djúpri økonomiska vitan.

- Men hvat kemur annars føroyskur pengapolitikkur einum íslendskum stjóra við? Ætlar hann, at Føroyar skulu blíva ein integreraður partur av tí íslendsku sápubløðru-økonomiini? Ella hevur hann eina heilt aðra privata dagsskrá? Hetta er, ið hvussu so er, ein fulkomuliga óacceptabul innblanding í erkvisnan føroyskan fíggjar-problematikk.

Oghvígloypirtað"óhefta" blaðið, *Sosialurin* einum so vulgerum politiskum glepsi í ráum líki, uttan at stilla ein einasta uppklárandi mótspurning? Er *Sosialurin* farin at renna ørindi fyri íslendingar?

Fyri tað fyrsta veit hetta *íslendska tilpiss* ikki eitt vet meira um málið, enn føroyingar sjálvir kunnu hugsa sær til. Fyri tað næsta vísti hansara naiva skammrósan av privatisering, at hann er inhabilur og hevur lítla hylling á, hvat føroyska bankamálið reelt snýr seg um. Fyri tað triðja rakar tað als ikki nakran íslending, hvussu føroyingar skipa seg politiskt ella fíggjarliga – hetta er púra ótolulig íslendsk "***ideologisk imperialisma***"!

Vit hava leingi havt fólk, sum hava runnið á leistum fyri íslendingar og kyniskt hava avreitt fyritøku eftir fyritøku umframt harðvunnin fiskirættindi til Íslands, antin beinleiðis ella kanska via strámenn. Hetta hevur verið ein fíggjarligur sorgarleikur í fleiri ár, og føroyingar hava latið seg leitt sum sakleys lomb til íslendska slaktibonkin. Men tað má vera eitt moralskt mark fyri, hvussu nógv útlendingar sleppa at blanda seg uppí føroysk viðurskifti.

**Resignatión og defaitisma**

Hví eru ikki fleiri føroyskir politikkarar, sum mótmæla avreiðingini og taktleysu íslendsku uppíblandingini? Hvat er orsøkin til hetta mannminkandi politiska uppgávulyndi og hesa undarligu føroysku defaitismu mótvegis teimum íslendsku investeringum, sum kunnu mergsúgva føroyskt vinnulív?

Effektiva danska fyritøkan DFDS mátti í síni tíð kempa fyri bara at kunna fáa kei- og havnapláss í Havn - føroyska skipafelagið var heldur ikki beinleiðis forkelað, men so skjótt sum íslendska felagið *Eimskip* kom til landið, fóru undirbrotligir føroyingar at útvega teimum alskyns sømdir, bæði í Havn og í Runavík. Men hvussu er gingið við farmagjøldum og service, síðani vit næstan fingu íslendskt monopol? Ja, tað gongur sjón fyri søgn - man saknar sanniliga danska kapping, effektivitet og initiativ.

Sum eitt annað kuriosum kann eg nevna, at danska fyritøkan *Jyske Bank* hevði í 80'unum eina skikkiliga ætlan um at lata upp eina lítla filial í Havn, men tá reisti seg eitt satt ódnarveður av mótmælum, forargilsi og indignatión. Bæði løtupolitikkarar og vinnulívsmenn ýldu um "danska imperialismu" og ótolandi finansiella uppíblanding, so havnarfólk tordu illa at leiga danska bankanum høli. Tað var eisini skjótt, at *Jyske Bank* bakkaði.

Men tað er alsamt gátuført fyri fólk, sum ikki dagliga ferðast í fíggjarklikum, HVÍ teir somu menninir, sum brølaðu alskyns ókvæmisorð eftir eini lítlari danskari bankadeild í Havn, heilt lata sær lynda í dag og STEINTIGA, nú Kaupting og aðrir íslendskir skutilsveinar profiterað av føroyskum gáloysni, sum kann føra til, at íslendingar, sum frá líður, annektera ein stóran part av okkara vinnulívi.

Hvat býr undir hesi óhugnaligu larmandi tøgn, nú tað tykist, sum um aggressivir íslendingar eru við at taka vinnulívsmenn okkara av bóli. Hví dýpdarkanna fjølmiðlarnir als ikki hetta pínliga málið?

Hví referera føroysk bløð ikki nakað av tí debatt, sum júst hevur verið í donskum bløðum um tað ódámliga globala íslendska skattacirkussið, sum fær sjálvt garvaðar spekulantar at vamlast!

Í Føroyum skulu føroyingar, og avgjørt *ikki* íslendingar, ráða!

## Rætting til tíðindasendingina á middegi hósdagin 16 november

**Vegna**
**Føroya Kommunufelag**
**Rósa Samuelsen**
**Formaður**

Í tíðindasendingini á middegi Hósdagin 16 november, var ein av yvirskriftinum at " Kommunurnar eiga at yvirtaka eldraøkið, men neyðugt er at skipa tær í størri eindir fyrst, **ta heldur Føroya Kommunufelag"**...

Hetta metir Føroya Kommunufelag vera ein sera missvísandi yvirskrift. Talan var um eina samrøðu ímillum útvarpskvinnu og stýrislim í Føroya Kommunufelag, har ið nevndi stýrislimir legði fram sína persónligu fatan av, hvørt eldraøkið skal leggjast kommununum at umsita, og hvørjar fyritreytir eru neyðugar um hetta skal lata seg gera.

**Føroya Kommunufelag vil við hesum boða frá** at felagið ikki hevur melda út, at kommunurnar eiga at yvirtaka eldraøkið, og at fyritreytin fyri hesum er størri kommunalar eindir

Føroya Kommunufelag vil hinvegin vísa á, at felagið altíð hevur havt tað fatan, at um kommunusamanleggingar skulu fara fram, so er tað tær einstøku kommunurnar sum skulu taka støðu til hetta. Hvørji øki skulu leggjast út, í hvørji ræðfesting og undir hvørjum umstøðum hetta skal henda, er eftir felagsins tykki ein samráðingarspurningur ímillum land og kommunur.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.